# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

8. apríl fingu Siri og Ernst Jón Mortensen, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3740 gr.

18. apríl fingu Dora Jacobsen og Petur Olivur Splidt, Saltangará, ein son, sum eitur Levi Olivursson Splidt. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3350 gr.

24. apríl fingu Elin Hentze og Sjúrður Andreassen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3450 gr.

24. apríl fingu Selma Høgnesen og Oddur á Marknagili, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3675 gr.

26. apríl fingu Beinta Lamhauge og Vøgg Nyholm Debess, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4300 gr.

26. apríl fingu Jórunn Fjallstein og Hans Jákup Eiðisgarð, Norðskáli, eina dóttur, ið eitur Lív. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

27. apríl fingu Katrina og Hjalmar Hansen, Rituvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3930 gr.

27. apríl fingu Poula Højgaard og Tórheðin Thomsen, Hoyvík, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 3250 gr.

27. apríl fingu Durita Jacobsen og Meinhard Fróði Højgaard, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3200 gr.

27. apríl fingu Anja Wardum og Svein Hansen, Velbastaður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3550 gr.

29. apríl fingu Jana Jacobsen og Sylvin Rasmussen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3350 gr.

29. apríl fingu Sonja og Eyðun Kjølbro, Klaksvík, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 5300 gr.

29. apríl fingu Beinta og Birgir F. Kass, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long ogvigaði 3300 gr.

30. apríl fingu Sólrun Hammer og Mortan Poulsen, Signabøur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

30. apríl fingu Óluva í Gong og Erling Egholm, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3850 gr.

30. apríl fingu Joan og Jan Skoralíð, Leirvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

1. mai fingu Malan og Øssur Steinhólm, Leirvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4540 gr.

1. mai fingu Kristrunn Nicodemussen, Sandur og Janus Petersen, Húsavík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

1. mai fingu Heiðvík og Ólavur Reinert, Norðradalur, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 3950 gr.

2. mai fingu Elly og Andreas Petur Hansen, Tórshavn, tvíburar - gentur. Tann eina var 52 cm. long og vigaði 2850 gr. og hin var 51 cm. long og vigaði 3020 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 5. mai giftast Margith Elmelund Petersen úr Tórshavn og Mikkel Niels Brock Hansen úr Ringsted. Vígslan verður í Højdevangskirken (Amager) og veitslan verður fyri innbodnum í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.

Leygardagin 5. mai kl.14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Noomi Káradóttir Jacobsen og Rúni Rasmussen, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Leygardagin 5. mai kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Nomi Jóhannes-dóttir Haraldsen, Miðvágur og Kaj van Elzelingen, Tommerup. Opið hús verður í SÍF-húsinum í Sandavági frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**

Fríggjadagin 4. mai hava Margit og Hanus Hansen, Kráarvegur í Havn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum fyri innbondum.

# Ellen Lützen 98 ár

Sunnudagin 6.mai verður Ellen Lützen í Havn 98 ár.

Ellen er fødd niðri í Stovu í Sjúrðargarði í Fámjin. Foreldrini vóru Anna og Ellindur Erlingsson. Tey vóru 12 systkin, níggju systrar og tríggir beiggjar. Ellen giftist við tí javngamla Mogens Lützen, sum doyði í fjør. Tað kann vera nevnt, at tey náddu at vera gift í ikki færri enn 73 ár. Vit kunnu ikki siga við vissu, at hetta er met, men tað kann so ikki vera langt frá.



*Her síggja vit Mogens og Ellen á 73 ára brúðleypsdegnum 20. august 2005. Munnu nøkur hjún vera í Føroyum, sum hava verið gift longri?*

Tað er ein stuttlig søga um, hvussu Ellen og Mogens funnu saman. Hetta var á hospitalinum, har hon starvaðist sum sjúkrasystir. Mogens hevði verið so óheppin - ella meira at kalla heppin, tá hugsað verður um avleiðingarnar - at seta eitt grasstrá í hálsin, sum ikki fekst burtur við egnari hjálp. Tískil mátti hann fara á hospitalið at fáa hetta orðnað. Sjúkrasystirin var Ellen úr Fámjin og ferdugt var! Hetta grasstráið kom tískil at gerast hansara lagna og lukka.

Tað ber illa til at nevna Ellen uttan at nevna Mogens eisini. Hann var sonur Ellen og Valdemar Lützen, sum grundlegði handilsfyritøkuna við sama navni. Hon hevur havt eitt sera stórt virksemi gjøgnum tíðirnar, men serliga gjørdist hon kend millum manna fyri sølu av "kul, koks og brænde".

Tað kom at gerast Mogens, sum kom at dríva fyritøkuna víðari aftaná pápan. Hann fekk útbúgving í Danmark og starvaðist her, inntil hann fyrst í 30-unum fekk boð um at koma heim aftur.

Tá fóru tey eisini undir sølu av olju, bensini og petroleum, sum varð selt til skip og húsarhald kring landið.

Tað ber til at lesa meira um virksemið hjá Valdemar Lützen á heimasíðuni: www.fiskimannafelag.fo Tað verður klikt inn á tilvísingina til gomlu heimasíðuna, og greinin er at finna í blaði nr. 335.

Tá heimsbardagin brast á, gjørdist Mogens saman við Brockie enskur varakonsul, og teir vóru "vara" hjá pápanum Valdemar og Mason, sum vóru konsular. Tað er óneyðugt at siga, at hetta hava verið týdningarmiklir sessir undir bretsku hersetingini.

Tað kann verða nevnt, at hesir fýra, sum røktu konslastarvið, vóru samdir um, at føroyska flaggið skuldi góðkennast, og sendu teir fjarrit til London við hesum boðum. Hetta er eisini ein partur av okkara flaggsøgu. Seinni gjørdist Mogens franskur konsul. Mogens var eisini í eini 25 ár fram til 1980 nevndarlimur í Føroya Banka. Her var hann kendur sum ein skilamaður. Mogens var í nógv ár virkin limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag.

Fremst av øllum var Valdemar Lützen ein fyritøka, har arbeiðsfólkið treivst, og tað eru fleiri dømi um fólk, sum arbeiddu her í 50 ár og meira enn tað.

Aftanfyri alt hetta virksemi mátti standa ein góð kvinna. Ellen var eisini Mogens ein góð konu, sum hevur stýrt húsinum við myndugleika, og eigur hon eisini sín part av avrikinum hjá manninum. Hon er framvegis skilagóð. Tað hevur altíð verið stuttligt at hitta Ellen. Skilið er gott, hon dugir eisini væl at greiða frá. Hon hevur framvegis eina støðu til støðuna í landinum. Hon kann gott vera eitt sindur braneggjað!

Ellen og Mogens fingu fimm børn. Tey eru Valdemar, sum er giftur við Nannu úr Klaksvík, Kim, sum er giftur við Ásu úr Norðagøtu, Anni, sum er ógift, og Eydna, sum er gift við Svend, sum er dani, tey búgva niðri, og Herluf, sum doyði í 1987. Afturat teimum vaks systirsonurin Ellindur upp hjá teimum, tá mamma hansara doyði, tá hann var heilt lítil.

Nú hevur Ellen nátt ein aldur, sum er teimum fægstu beskorið. Hon hevur upplivað nógv og verið ein partur av menningini í Havn. Seinastu árini hevur hon búð á Lágargarði, og hon letur sera væl at, at her er framúr gott at vera.

Góða Ellen! Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum!

**ó.**

**Dagurin**

**4. mai. Florianus**, deyður umleið ár 300. Rómverskur heryvirmaður og embætismaður, sum royndi at bjarga kristnum fólki, ið vórðu forfylgd, men hann varð sjálvur tikin og fyribeindur.

**5. mai. Gotthard**, deyður í 1038. Abbati og biskupur í Hildesheim. Týskt navn, samansett av orðunum fyri Gud og harður.

**6. mai. Jóhannes fyri borgliði** (Johannes ante portam). Dagurin hildin til minnis um at ápostulin Jóhannes varð illa píndur uttan fyri borgliðið Porta Latina í Róm. Hann komst undan, men varð seinni rikin í útlegd út á oynna Patmos.

Jóhannes Patursson varð føddur hendan dagin í 1866, og Hans Andrias Djurhuus doyði hendan dagin í 1951.

**7. mai. Flavia,** deyð í umleið ár 95. Henda abbadóttir keisaran Vespasianus gjørdist kristin og varð rikin í útlegd.

## Tøkk

Ein hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ein ella annan hátt sýndu samkenslu, tá kæra mamma mín, systir, mostur, ommusystir og langommusystir okkara

**Elsebeth Sofía (Elspa) Midjord**
Akrar

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til familju og vinir, ið hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk til Frelsunarherin fyri góð orð og sang til bønarhaldið í kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
Tøkk til Patrick Neergaard prest, sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Tøkk til starvsfólkini á Eldrasambýlinum í Hvalba.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Erland**